Íslendski samferðsluráðharrin:

Menna ferðasambandið landanna millum

Íslendski samferðsluráðharrin og føroyski starvsbróður hansara hava á fundi avgjørt at heita á flogfeløgini bæði, um at bera so í bandi, at túratalið millum londini verður økt. – Hetta er neyðugt, um samstarvið landanna millum skal útbyggjast

SVEINUR TRÓNDARSON

Í seinastu viku var íslendski samferðsluráðharrin, Halldór Bløndall á óalmennari vitjan í Føroyum.

Við sær í ferðalagnum hevði hann formannin í íslendska ferðavinnuráðnum, Birgir Torgilsson og býarstjóran á Akureyri.

Sum verða man, tá eitt slíkt fylgi kemur til lands, um tað so er alment ella óalment, so verður ferðast nógv.

Fylgið var ymsastaðni í landinum, og hóast veðrið og krim legði forðingar fyri portum av skránni, so sá íslendska ferðalagið ein stóran part av Føroyum.

Millum annað var ferðalagið í Klaksvík og heilsaði upp á Jógvan við Keldu. Haðani var ætlanin at fara til Skúvoyar við tyrlu, men av tí at veðrið var so vánaligt, varð hesin túrur avlýstur.

Hóast talan var um eina óalmenna vitjan, so hitti íslendski samferðsluráðharrin føroyska starvsbróðurin á ferðini, og teir tosaðu um í hvønn mun teir kundu fremja samstarvi landanna millum.

Á tíðindafundinum, sum var aftaná, søgdu ráðharrarnir báðir, at teir høvdu tosað um at gera eina felags marknaðarføring av báðum londunum.

– Ísland hevur eitt vælútbygt net av »destinatiónum«. Teir flúgva til 16 stød í Europa og 5 í USA, og gera nógv fyri at marknaðarføra sína ferðavinnu. Tí hevði tað verið skilagott fyri føroyingar, at tikið upp samstarv við íslendingar um marknaðarføring av okkara landið.

Halldór Bløndall legði afturat, at íslendingar hava lagt stóran dent á at marknaðarføra Ísland, sum eitt ferðamannaland, og tað verður framhaldandi gjørt eitt stórt arbeiði við marknaðarføring.

Hann nevndi eisini, at tað árliga eru um 400 túsund ferðandi í Íslandi, og at hetta talið er vaksandi ár um ár.

Finnbogi Arge vísti í hesum sambandi á møguleikan fyri samstarvi eitt nú við felags marknaðarføring av báðum londunum.

– Vit hava eitt samstarv, Fitur eitur tað, sum av fíggjarlógini í báðum londunum fær pening, sum er oyramerktur til at fíggja eina felags marknaðarføring, tí tað gevur betri avkast, enn um vit fara út hvør í sínum lagi fara út at marknaðarføra okkara lond, sigur Finnbogi Arge.

– Ein møguleiki er, at vit gera pakkatúrar, har eitt nú evropeisk ferðafólk keypa ein túr til Íslands, og so er ein túrur til Føroyar roknaður við í prísin. Hetta gevur okkum ferðafólk, sum kanska ikki høvdu komið annars, men tað gevur ferðavinnuni eitt nógv breiðari úrval at bjóða ferðafólkum, leggur hann afturat.

Ynski um øktan tittleika

Fyri at kunna gera eina felags marknaðarføring er neyðugt við einum øktum samstarvi landanna millum.

Tað vóru íslendingar sum byrjaðu at flúgva til Føroya, men síðani tá er flúgvingin vestur eftir dottin púra niður ímillum.

– Vit hava í dag 30 túrar til Danmarkar um vikuna, meðan vit bara hava tríggjar túrar um vikuna til Íslands og tí er tað av stórum týdningi, at vit heita á flogfeløgini bæði um at økja títtleikan til kanska fimm ferðir um vikuna.

– Vit føroyingar hava fingið til vana, at fara til fremmand lond um Danmark, men við at brúka Ísland eisini fáa vit nógv betri møguleikar í summum førum. Til dømis er New York bara sjey tímar úr Føroyum, um vit ferðast um Ísland.

Ráðharrarnir báðir eru samdir um, at tað fer at økja um áhugan at koma til Føroya um Ísland, um títtleikin verður øktur.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog skoytti í hesum sambandi uppí, at teir í løtuni kanna møguleikan fyri øktum títtleika, og hann segði tað stuttsiktaða málið verða fimm ferðir um vikuna, og uppá longri sikt dagliga flúgving.

– Men hetta seinna liggur nokk longri úti í framtíðini, segði Magni Arge.

Vinnuligt samstarv

Afturat samferðsluni hevur Finnbogi Arge eisini vinnumál, og hann staðfesti, at tað longu í dag er eitt gott samstarv millum føroyskar og íslendskar fyritøkur. Hann vísti á samstarvi millum Marel í Íslandi og Petersen & Guttesen og Nomatek í Føroyum.

– Men skulu vit gera meira við hetta samstarvið, so er neyðugt við betri ferðamøguleikum við Ísland.



Halldór Bløndall og Finnbogi Arge heilsast beint eftir at teir hava undirskrivað yvirlýsingina um økt samstarv (Mynd: Vinnumálastýrið)

Góð samferðsla fremur økismenningina



– Við at betra samferðsluna í útjaðaranum tryggjað vit okkum, at fólk ikki flytur úr smærru bygdunum, sigur Halldór Bløndall, íslendskur samferðsluráðharri

– Í einum fiskivinnusamfelag er neyðugt at tryggja økismenningina, tí verður tað ikki gjørt, so er vandi fyri, at bygdirnar detta niður fyri, segði íslendski samferðsluráðharrin, Halldór Bløndall á tíðindafundinum, og hetta verður gjørt eitt nú við at betra samferðslumøguleikarnar

SVEINUR TRÓNDARSON

Íslendska samfelagið er eins og tað føroyska samfelagið bygt á fiskivinnuna. Og eins og her heima hjá okkum hava íslendingar merkt niðurgongdina í fiskivinnuni.

Men tað royna teir at bøta upp á eitt nú við bøttum samferðslukorum í útjaðarunum.

Hetta verður millum annað gjørt við at gera tunlar millum bygdirnar, soleiðis at fólk ikki flytur til størru plássini.

– Vit hava merkt, at tunnlarnir ikki bara verða brúktir til »einvegis« ferðslu, segði Halldór Bløndall smílandi.

Sambandið var vánaligt í útjaðaraøkinum, og tosað var um hvussu ein kundi betra liviumstøðurnar og um vinnumøguleikarnar hjá fólkinum, sum búði í útjaðaranum. Ein møguleiki, sumvar nevndur var, at útbyggja flogvøllin. Tá skuldi ein eldri maður hava tikið til, at tað var nóg mikið at útbyggja fráfaringarhøllina.

Henda útsøgn hevur tó víst seg at verða heilt við síðuna av.

Samstundis sum arbeitt verður við, at útbyggja samferðslumøguleikarnar, so verður eisini lagdur dentur á at geva ungdóminum lestrarmøguleika í øðrum økjum enn bara høvuðsstaðnum, segði býarstjórin á Akureyri.

Hann vísti eisini á, at teir høvdu góðar royndir, av kommunusamanleggingum, og tað er ein áhugaverd søga, tí fyri stuttum var ein dani í Føroyum, sum vísti á tað beint øvugta, at tað ikki bara var rætt.

Undirsjóvartunnilin meiri brúktur

Her heima verður nógv tosað um undirsjóvarsamband til Vágoynna. Á hesum øki hava íslendingar royndir, tí fyri ikki so langari tíð síðani tóku teir ein slíkan í brúk, hann er um Hvalsfjørð, og tær royndir, sum teir hava eru, at hann verður brúktur nógv meira, enn roknað var við.

– Tá vit fóru undir arbeiði vóru gjørdar nakrar útroknингar sum bygdu á eina ásetta ferðslumeting. Vit hava funnið út av, at henda útrokning var gjørd ov varisliga, tí at ferðslan er størri enn tað upprunaliga var roknað var við, sigur Halldór Bløndall.

Tunnilin er m.a. fíggjaður við bummpengum, og tann størra nýtslan av tunnlinum um Hvalsfjørð fer eftir øllum at døma at hava við sær eina lækking av kostnaðinum fyri ein túr.

– Vit kunnu í dag staðfesta, at avgerðin um at fara undir Hvalsfjørð við tunnlinum var røtt, og tí at hann verður brúktur nógv.

Finnbogi Arge sigur, at hetta er ein ábending um, at metingarnar hjá Vinnumálastýrinum um ferðslulopið í einum komandi undirsjóvartunnli um Vestmannasund er á eini góðari leið.

– Vit hava verið ógvuliga varnir tá vit mettu ferðslulopið, og sammeta vit broytingarnar í íslendsku tølunum við okkara, so sær tað heilt gott út. Tað er jú eisini meiningin tá ein ger eina kostnað-nyttu kanning, at hon skal byggja á varisliga mett tøl, sigur Finnbogi Arge, landsstýrismaður